Kyndil-Neistin 31-23 (16-11):

# Oddaliðið heldur skansanum



*Karl Oddmar hevur her fatur á fleiri mótstøðumonnum, men samanlagt munaði hetta tó lítið, tá Kyndil vann tryggan sigur á Neistanum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Kyndil er enn tvey stig undan næstu liðunum, nú bara eitt umfar er eftir av grundspælinum**

ATLANTIC AIRWYAS-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Hesum syrgdu teir grønu sjálvir fyri, tá teir sunnudagin spældu næstu grannauppgerðina á árinum móti Neistanum.

Og lat tað verða sagt alt fyri eitt, at spenningurin undan grannauppgerðini mangan hevur verið størri, enn hann var tað hesaferð. Meðan Kyndil - sum vant - ger um seg frammi í oddinum, so hevur Neistin aftur í ár eitt av sínum lakaru kappingarárum. Fyrstu lítlu løtuna av dystinum vóru teir bláu annars væl við, men eftir einum korterið kom munurin veruliga til sjóndar. Uttan at teir veruliga spílaðu seg út, dróg Kyndil stútt og støðugt frá teimum bláu, sum ikki megnaðu at gera stórvegis mótstøðu í so máta.

Eftir steðgin var gongdin tann sama. Kyndil hevði fult tamarhald á tí mesta, sum gekk fyri seg. Kanska eisini tí bláu grannarnir als ikki toktust trúgva uppá, at uppgávan kundi greiðast.

Stigatalvan tosar eisini sítt týðiliga mál í so máta. Har er Kyndil ovasta liðið eftir eitt grundspæl, har liðið fyri tað mesta hevur sýnt klassan. Sama klassa hevur Neistin á ongan hátt sýnt. Verður sæð burtur frá fyrsta dystinum móti einum illa uppløgdum StÍF-liði, so hevur liðið eisini drigið púrasta svart. Ein støða, sum helst eisini stendur við í endaspælinum, um ikki annað skinn veðrur tikið um bak.

## FAKTA UM DYSTIN

**Kyndil-Neistin 31-23 (16-11)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Josef Abrahamsen 7(1), Marius Joensen 7, Rókur Akralíð 5, Høgni Klein 5(3), Hans Áki Dal-Christansen 3, Janus Einar Sørensen 2, Ken Zachariassen 1(1), Hjalti M. Jacobsen 1
**Neistin:** Áki Mørk 9(2), Blagoje Buha 6, Tróndur Kragesteen 4, Dann Thorleifsson 2, Bogi Berg 1, Karl Oddmar Rasmussen 1
**Brotskøst:** Kyndil 6, Neistin 3
**Útvísingar:** Kyndil 2, Neistin 4
**Dómarar:** Petur S. Dahl & Hallur Danielsen

# Vestmanna á odda

**Oddadysturin í Klaksvík endaði við greiðum sigri til útiliðið úr Vestmanna, sum harvið hevur tikið leiðsluna í fremstu deildini nú fýra umfør eru telvd.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Undan dystinum leygardagin í Klaksík vóru havnarmenn og vestmenningar fremstir, meðan klaksvíkingar vóru beint í hølunum, hálvt stig aftanfyri. Klaksvíkingar mangladu eins og vestmenningar fasta mannin á 2. borði og lagt var tí upp til ein javnan dyst.

Ikki gekk so long tíð til vestmenningar høvdu vunnið seg fram á eina 2-0 leiðslu. Samson Højgaard vann á Willa Olsen. Talvið var fløkt og eitt skifti sá tað svart út hjá Samsoni, men hann reið ódnuna av sær og vann loksins.

Jákup á Rógvi Andreasen mannaði 4. borð hjá vestmenningum leygardagin. Hann kom væl frá fyrsta dysti sínum í 1. deild í ár, tá hann vann á Rana Baldursson.

Uppgerðin á 3. borði endaði við sigri til heimamannin Tummas Martin Sólsker. Tað var líkt til, at Sjúrður Thorsteinsson var komin fyri seg tá hann í helst javnari støðu leikti óneyvt. Tummas Martin hálaði stigið inn.

John Rødgaard vann í eyðkendum stíli á Ólavi Simonsen. John, sum hevði hvíta fólkið, var ikki bangin fyri at fara í eitt rættiliga javnt endatalv. Spakuliga og effektivt kroysti hann Ólav í eitt horn.

Mangan skilir tú ikki hvussu tú hevur tapt slík jøvn talv. Fleiri av okkum hava upplivað júst somu lagnu - tá vit hava telvað ímóti Rødgaard - sum Ólavur leygardagin. Helst liggur svarið í djúpd, fínteknikki og royndunum hjá Rødgaard.

3-1 til vestmenningar. Úrslitið svíðir ivaleyst hjá klaksvíkingum, tí teir hava neyvan ráð til stórtap. Longu nú hava teir tapt tveir dystir og kravið hjá klaksvíkingum er ikki at tapa fleiri dystir, um teir skulu verða føroyameistarar.

Vestmenningar hinvegin halda fram við støðugum góðum úrslitum. Teir hava vunnið tríggjar dystir og leikt ein javnan, móti havnarmonnum í 3. umfari.

### Hvalvíkingar úr botninum

Heldur óvæntað vóru hvalvíkingar aftastir áðrenn fjórða umfar. Men við 3-1 sigrinum móti miðliðnum úr Kollafirði, er vend komin í.

Talvini á ovastu tveimum borðunum endaðu við javnleiki. Haldur Suni Johansen er komin í gongd eftir tvey tap í fyrstu umførunum. Á seinasta leikdegi leikti hann ein góðan javnleik móti Ólavi Simonsen og leygardagin fekk hann ein kærkomnan javnleik móti Hans Kristiani Simonsen. Finnbjørn Zachariassen og Torbjørn Thomsen leiktu somuleiðis javnt. Finnbjørn er umsíður komin á stigatalvuna.

Martin Brekká vann á bróður Torbjørns, Bernhardi Thomsen og Gunnar Joensen vann á Karl Louis Johansen.

Ein frálíkur sigur til royndu menninar úr Hvalvík. Við úrslitinum leygardagin hava hvalvíkingar og kollfirðingar eins nógv stig, 6,5.

### Útsettur dystur

Havnarmenn og klaksvíkingar (KTF2) hava útsett teirra dyst til komandi vikuskifti. Havnarmenn eru hálvtfjórða stig aftanfyri vestmenningar, men kunnu við stórsigri á veteranunum á KTF2-liðnum taka oddaliðið aftur.

Lagt verður til brots aftur eftir nýggjár. Fimta umfar verður telvað 8. januar.

### FIDE World Cup

Upprunaliga ætlaði talvsamgongan FIDE at finna nýggjan heimsmeistara í HM-kappingini, sum verður telvað í hesum døgum í Khanty Mansyisk í Russlandi. Men tað er nú broytt til, at teir fremstu fýra telvararnir sleppa at royna seg ímóti teimum fýra fremstu frá herfyri leiktu HM-kappingini í San Luis, Argentina: Veselin Topalov, Peter Svidler, Viswanathan Anand og Alexander Morozevich.

Telvað verður eftir Knock-Out skipanini í Masyisk. Tr‡ umfør er telvd og nevnast kann, at hægstseedaði Vassily Ivanchuk tapti 1,5-0,5 í 2. umfari móti sekundantinum hjá heimsmeistaranum Topalov, Ivan Cheparinov. Hesin sami Cheparinov mátti út í kviktalvsumdyst móti Magnus Carlsen, tá dystur teirra endaði 1-1. Umdysturin varð leikur mánadagin eftir evstamark.

Mánadagin verður farið undir áttandadeilsfinalurnar.

### Talvúrslit og -støður

**1. deild - 4. umfar**

| | |
|---|---|
| Klaksvík 1 - Vestmanna | 1-3 |
| Ólavur Simonse - John Rødgaard | 0-1 |
| Wille Olsen - Samson Højgaard | 0-1 |
| Tummas M. Sólsker - Sjúrður Thorsteinsson | 1-0 |
| Rani Baldusson - Jákup á R. Andreasen | 0-1 |
| Kollafjørður - Hvalvík | 1-3 |
| Hans Kristian Simonsen - Haldur Suni Johansen | 0,5-0,5 |
| Torbjørn Thomsen - Finnbjørn Zachrs. | 0,5-0,5 |
| Bernhard Thomsen - Martin Brekká | 0-1 |
| Karl L. Johansen - Gunnar Joense | 0-1 |

**Støðan**

| | |
|---|---|
| Vestmanna | 10,5 |
| Klaksvík 1 | 8,0 |
| Havnin | 7,5 |
| Hvalvík | 6,5 |
| Kollafjørður | 6,5 |
| Klaksvík 2 | 5,0 |